# , ikki steintalvurnar hjá Mósesi



*Eitt sera grefligt um spill av tíð og kreftum var dømið, har Signar á Brúnni, sum landsstýrismaður rindaði lønir hjá Sjónvarpinum útyvir vanligu játtanina*

standa og skylda løn fyri gjørt arbeiði á einum landsstovni? Hví tordu tinglimir ikki at tippa hetta mál beinanvegin, áðrenn fjølmiðlarnir koyrdu tað so langt upp í snúningar, sum teir nú einaferð gjørdu? Mín niðurstrøða er, at man ræddist "systemið" so nógv, at man ikki frá politiskari síðu tordi at siga tað sjálvfylgiliga. Tað syrgliga er, at núverandi játtanarskipan og tann infleksibla praksisin mangan verðru síðusett við Stýrisskipanarlógina. Verður setningurin "brot á stýrisskipanarlógina" nevndur í fjølmiðlunum, so stinga politikarar eftir øllum at døma halan millum beinini. Hetta er ein beinleiðis vandi fyri fólkaræðið, tí at eitt undantak til játtanarreglarnar grundað á eitt hægri prinsipp um ikki at kunna skylda løn, kann aldrin verða brot á stýrisskipanarlógina. Um vit ikki hava Løgtingsmenn, ið staðfesta sín autoritet yvirfyri yvirivrigum embætisfólki, so endar galið, og eg havi varhugan av, at vit longu eru úti í einari suggu, ið ring verður at koma út úr.

## Glottar fyri framman

Tað eru tó glottar fyri framman. Løgtingsins Fíggjarnevnd hevur gjørt eitt uppskot um at niðurseta ein arbeiðsbólk at fyrireika eitt uppskot til játtanarlóg. Hetta er skilagott, um hesin bólkur fylgir tingsins vilja og megnar at venda gongdini, har embætisverkið í ovurídni gongur og strikar grunnar í andsøgn við tingsins - og harvið fólksins - vilja.

Eg vil í hesum sambandi koma við einum hjartasuffi. Tað er ótrúligt, sum virt føroyingar altíð eru fantasileysir, tá man setir fólk í slíkar arbeiðsbólkar. Sum ikki einaferð kemur man dragsandi við einum donskum embætismanni til nakað, ið vit saktans kunnu finna nógv góð høvd í Føroyum til at orna. Danski embætismaðurin dugir óivað sín ting, men eg kann ikki lata verða við at draga parallelar til okkara royndir av einum øðrum donskum embætismanni, ið kom her fyri nøkrum árum síðani, Tann maðurin æt Finn Norman Christensen, og úrslitið av hansara verki síggja vit í dag har vit hava eina alt ov dýra og stirvna almenna umsiting.

## ALS - er motivið kontroll?

Ein annar glotti er, at man politiskt hevur steðgað púra irrationellu jagstranina á øllum grunnum og ALS skipanini við at man hevur staðfest, at ALS ikki skal undir fíggjarlógina, sum annar almennur peningur. Hetta er gott, og er í tráð við tingsin - og harvið fólksins - vilja. Tó er tað eitt sindur ófrættakent, at serfrøðin innanveggja í Tinganesi tykist verða ósamd við serfrøðina uttanveggja. Kann hetta skyldast eitt ynski um kontroll?

Tað er umráðandi at ein nýggj játtanarlóg er greiðari enn gomlu reglarnar og tað er umráðandi at man steðgar gongdini, har embætisverkið í summum førum gongur tvørturum tingsins vilja. Ein játtanarskipan er bindiliðið millum Tingsins vilja og útinnandi valdið - hvørki meir ella minni.

## Føroyskt grundaða einkla játtanarskipan

Í álitinum hjá Grundlógarnevndini, ið er sera væl skrivað, hóast okkurt í tí er diskutabult, verður beinleiðis staðfest í uppskotinum til játtan av pengum, at skipanir sum ALS (hóast ikki nevnt serstakt) ikki nýtast at skula á fíggjarlógina. Hetta var ongantíð meiningin við stýrisskipanarlógini, men tað sær út til at betongjura og yvirivrig embætisfólk gera tað neyðugt at skera alt út í papp, fyri at tingsins vilji skal verða fylgdur. Tað skal verða mín vón, at man fer í holt við at diskutera broytingar í okkara stýrisskipan við eitt nú grundlógarálitinum sum grundarlag og fær eina effektiva føroyskt grundaða einkla játtanarskipan, ið ikki skal kunna elva til ivamál, sum vit hava havt í ríkiligt mát við tí gomlu.

# Vitan sum útflutningsvøra

TINGHELLUKLUMMAN

*Thomas Arabo*

Um ein føroyingur búsettur her, ella eitt føroyskt virki, selur eina serliga tænastu uttanlanda fyri pening, so er talan um sølu av vitan. Um hendan vitan er fingin til vega á skúlabonki ella í lívsins skúla er líka mikið.

## Næststørsta útflutningsvøra

Í løtuni verður nógv tosað um at finna vinnur, íð kunnu erstatta fiskivinnuna, sum jú er okkara høvuðsvinna. Tosað verður um vitanarvinnur, sum um tað er nakað nýtt fyribrigdi, at vit skulu útflyta slíkar. Vitanarvinna er longu í dag okkara næststørsti útflutningur.

## Ongastaðni skrásett

Eg havi roynt at funnið fram til, hvussu stórar upphæddir íð verða tjentar til landið á hendan hátt, men tað tykist ikki at vera nøkur neyv skráseting av hesum. Ivist onga løtu í at talan er um trícifraðar milliónaupphæddir.

## Vinnuskúlarnir og lívsins skúli høvuðsgrundarlagið

Størsta talið av fólki, íð selur sína vitan uttanlands, hevur sítt skúlagrundarlag á vinnuskúlunum. Her munu sjómansskúlarnir, maskinmeistaraskúlin og teir teknisku skúlarnir liggja fremst. Hundraðtals navigatørar, maskinmenn og handverkarar selja í dag sína vitan úti í heimi. Harafturat koma so fiskimenn, sum í lívsins skúla hava nomið sær serkunleika av einum og hvørjum slag.

## Nýggjar vinnur komnar afturat

Seinastu árini eru so tær nýggju vinnurnar komnar afturat. Her hugsi eg um flogfólkið hjá okkum, og teir, sum við hepnari hond veita tænastur til oljuvinnuna. Nakrar av okkara edv fyritøkum eru eisini byrjaðar at fáa fótin innum á europæiska marknaðinum.

## Hægru útbúgvingarnar ta veikastu umboðanina

Higartil má tíverri sigast, at tær hægru útbúgvingarnar ikki eru serliga nógv umboðaðar í vitanar útflutningi. Tað kann hava sína orsøk í tí veldugu ekspansión, ið vit hava havt í okkara umsiting. Nú tað treingist á umsitingarrókunum, sær út til at fólk byrja at ressast og vilja hava nakað at henda. Hetta er bara gott, tí her er helst eitt stórt potentiali, so tað er bara at bróta upp um ermar og fara í sving. Og so eitt hjartasuff til talsfólkini hjá hesum bólki "Tað var ikki steinøld í landinum, áðrenn tit komu til"